# ítróttur

Nr. 20 • leygardagur • 29. januar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Stjørnan-VB 23-21(11-12) samanlagt 46-45

# Stjørnan í finaluni



*Rómurin var øgiligur í Klaksvík, tá ið Stjørnan hevði tryggjað sær pláss í steypafinaluna við at vinna 23-21 á VB.*
*Mynd: Bárður Lydersen*

**Við einum góðum avriki eftir steðgin eydnaðist tað Stjørnuni at vinna á VB við tveimum málum og harvið tryggja sær sess í steypafinaluni, har tær skulu hitta Neistan**

STEYPADRAMA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Stjørnan megnaði at vaska eyðmýkjandi ósigurin fyri VB seinasta sunnudag á heimavølli av sær, tá ið tær í gjár koppaðu vágskvinnum í seinnu hálvfinaluni í Coca-Cola kappingini.

### VB legði bragdliga fyri

Tað vóru annars vágskvinnur, ið høvdu besta útgangsstøði undan dystinum, av tí at tær høvdu vunnið fyrru hálvfinaluna í Vági tvær vikur frammanundan við einum máli, 24-23.

VB var eisini betra liðið fyrstu løtuna av dystnum, og tað var skjótt, at tær løgdu seg á odda. Stjørnan megnaði ikki at fáa hol á, fyrr enn nærum níggju minuttir vóru leiktir av dystinum, og tað má sigast at verða rættuliga óvanligt hjá greipuvinnarunum.

Tað tóktist sum um, at heimaliðið var eitt sindur fjáltursstungið, og at tær stúrdu fyri, at tað skuldi ganga eins galið sum sunnudagin, tá ið tær taptu við heili 16 málum fyri VB í Klaksvík.

VB gjørdi sær dælt av trilvandi byrjanini hjá Stjørnuni, og um miðjan fyrra hálvleik høvdu tær lagt seg á odda við fýra málum, men so kom heimaliðið spakuligani fyri seg.

Verjan hjá heimaliðnum gjørdist tættari og ágrýtnari, og tað sást á øllum brøgdum, at tær ætlaðu sær nakað í hesum dystinum. Eitt gott dømi, um hvussu stinn verjan hjá Stjørnuni royndist, er, at tær megnaðu at forða Daivu Tomaite, ið annars skeyt heili 16 mál sunnudagin, ið at skora fleiri enn fýra mál í dystinum, harav eitt var við brotskasti.

### Togaðu seg innaftur

Tað var ikki fyrr enn móti endanum av fyrra hálvleiki, at heimaliðið fekk togað sær inn á vágskvinnur aftur. Stjørnan hevði eina góða løtu tá, og glið kom á álopsspælið, og tá ið VB eisini samstundis loyvdi sær at fáa tvær útvísingar og misnýta eitt brotskast seinastu løtuna fyri steðgin, var dysturin aftur púra opin, tá ið hálvleikur var, tí tá var støðan 12-11 til gestirnar.

Hóast VB tíðliga í seinna hálvleiki legði seg á odda við tveimum málum, 14-12 og samanlagt við trimum, fekk hetta ikki heimaliðið til at fella í fátt. Tær koyrdu á við sínum spæli, og spakuliga ótu tær seg inn á gestirnar.

Tað gekk eisini skjótt, tí tá ið VB bert megnaði at skora tvær ferðir innan fyri nærum 20 minuttir í seinna hálvleiki, samstundis sum Stjørnan fleiri ferðir sendi framvið Astu í VB-málinum, og so var tað bráddliga Stjørnan, ið hevði bestu kortini á hondini. Tær vóru nevnliga á odda 21-18, tá ið einans fýra minuttir vóru eftir at leika.

VB royndi at svara aftur, og hóast Rannvá Augustinussen og Aukse við tveimum skjótum málum minkaðu niður 21-20, gjørdist mótbrekkan ov tung fyri VB at vinna á, og frøðin á stóru áskoðarafjøldini í Klaksvík var stór, tá ið Katarina Stjepanov tvey sekund fyri leiklok langaði bóltin í kassan til endaliga úrslitið 23-21 til Stjørnuna, sum harvið hevur møguleika fyri at verja sítt heiti sum steypavinnarar, tá ið finalan verður leikt um eina viku.

### Stjørnan-VB 23-21(11-12)

**Stjørnan:** Alina Olaru 7, Katarina Stjepanov 5, Annika Ljósstein 5(1), Bára S. Klakstein 3, Una Olsen 2, Joan M. Djordjevic 1

**VB:** Aukse Vysniaskaite 8(2), Rannvá Augustinussen 4, Daiva Tomaite 4, Christina Holm 3, Arnleyð Hjelm 1, Gurið Mortensen 1

**Brotskøst:** Stjørnan 2(1), VB 5(2)

**Útvísingar:** Stjørnan 3, VB 3

**Dómarar:** Kristjan Johansen og Sámal Hansen

---

Dystaryvirlit:
**Hondbóltur**

**30.01.05 Sunset-kappingin**

| Kl. | Dystur | Høll | Dómarar: |
|---|---|---|---|
| Kl. 14.30 | Neistin-VB | Ítróttarhøllin á Hálsi | Hannis/Uni |
| Kl. 15.00 | Søljan-VÍF | Høllin á Giljanesi | Heri/Brandur |
| Kl. 15.00 | Stjørnan-StÍF | KÍ-høllin | Eyðun/Andreas |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kl. 16.00 | VÍF-Kyndil | Høllin í Vestmanna | Kári/Dánjal |
| Kl. 16.00 | KÍF-StÍF | Hoyvíkshøllin | Sámal/Kristjan |
| Kl. 16.00 | Neistin-H71 | Ítróttarhøllin á Hálsi | Hannis/Uni |

**Flogbóltur:**
**29.01.05 Meistaradeildin kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kl. 14.00 | KÍF-TB | Hoyvíkshøllin | Mjølnir |
| Kl. 16.00 | Dráttur-ÍF | Giljanes | Mjølnir |

30.01.05
Meistaradeildin kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kl. 14.00 | SÍ-Mjølnir | Sørvágur | KÍF |
| Kl. 15.00 | TB-Dráttur | Trongisvági | KÍF |

Meistaradeildin menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Kl. 15.00 | Fleyr-ÍF | Gundadalshøllin | Fram |
| Kl. 16.00 | SÍ-Mjølnir | Sørvágur | Fram |

---

# H71 fær neyvan viðhald

**Tað tykist lítið sannlíkt, at H71 fær viðhald í kæruni um dystin mikukvøldið**

HONDBÓLTSTRÆTA
*Jákup Mørk/Terji Nielsen*
*jakup@sosialurin.fo*
*terji@sosialurin.fo*

Enn hevur kappingarnevndin hjá HSF ikki tikið støðu í málinum. Og enn vil dómarafelagið ikki úttala seg um, hvørt dómararnir í dystinum millum StÍF og H71 gjørdu rætt í samband við umstrídda time-out´ið í dystinum mikukvøldið.

### Fordømi av Skála

Men sambært fordømi úr júst høllini á Skála, so er lítil ivi um, at dómararnir tóku røttu avgerðina, tá teir valdu at steðga álopi hjá H71, fyri síðani at geva strandingum nýggjan álopsmøguleika. Hetta tí teir høvdu biðið um time-out í undanfarna álopinum. Eitt time-out, sum hvørki dómarar ella leikarar hoyrdu nóg tíðliga vegna nógva gangin í høllini.

Í mars tapti StÍF avgerandi dyst móti Neistanum, men eftir dystin var tað serliga ein líknandi hending sum tann mikukvøldið, ið fekk umrøðuna.

StÍF kærdi tó ikki hendingina, men teir kannaðu málið, og boðini vóru greið, tá teir spurdu norska dómarafelagið um, hvussu time-out reglan skal skiljast, um so er, at dómararnir ov seint síggja, at biðið er um time-out.

»Floytuljóðið frá tíðtakara/skrivara steðgar í prinsippinum dystinum, og alt tað, sum hendir eftir hetta, verður ógildað, tó undantikið persónligar revsingar. T.v.s. gul kort, útvísingar v.m.«

Sostatt tykist lítil ivi vera um, at dómararnir mikukvøldið tóku røttu avgerðina, og at strandingar tí kunnu fyrireika seg til finaludyst annað vikuskiftið.

Men hinvegin siga reglarnar hjá Dansk Håndboldforbund, at eitt lið, ið hevur bóltin, og sum einki skeivt hevur gjørt, soleiðis sum tað var við H71 mikukvøldið, ikki kann missa bóltin aftur. Tað var annars tað, ið dómararnir gjørdu mikukvøldið, tá ið teir steðgaðu H71-álopinum, tóku time-outið og góvu StÍF nýtt álop.

Enn er tó eingin avgerð follin í málinum. Kappingarnevndin skuldi hava fund seinnapartin í gjár, eftir at blaðið var farið til prentingar.